## Heldur flogbólt enn Bush

Roðan, sum amerikanski forsetin, George W. Bush, helt gjáranáttina hevur fingið ymsa móttøku uttan fyri USA.

Avstralski forsætisráðharrin, John Howard, sigur seg vera fegnan um, at Bush hevur lovað ST-trygdarráðnum fleiri prógv fyri, at Irak hevur hópoyðingarvápn, tí á tann hátt kemur málið hagar, tað eigur at vera, sigur hann.

Í Japan hava politikararnir valt at halda seg frá viðmerkingum til røðuna, men stóra blaðið Asahi Shimbun skrivaði í gjár, at eftir røðuni at døma ætlar Bush ikki at geva irakum betri stundir til at gera eftir teirri seinastu ST-samtyktini. Niðurstøðan hjá blaðnum er, at kríggið er nærri aftan á røðuna.

Í Kina vita fólk valla, at amerikanski forsetin hevur hildið eina týðandi røðu. Kinesiska sjónvarpið sendi ikki røðuna, men valdi ístaðin at senda ein landsdyst í flogbólti millum Kina og Peru, og tá hann var liðugur, var ein opera á skránni.

Samstundis vísa meiningakanningar í USA, at har hevði røðan ta ætlaðu ávirkanina. Undan røðuni vístu kanningar, at 67 prosent av amerikanarunum tóku undir við at koyra Saddam Hussein frá við makt. Aftan á røðuna vóru tað 77 prosent, sum høvdu ta áskoðanina.

## Norðmenn gjalda fyri upphøgging

Í mai fer ein skipasmiðja í Norðurrusslandi undir at høggja tveir gamlar russiskar kavbátar upp. Arbeiðið er mett at taka einar seks ella sjey mánaðir og fer at kosta umleið 85 milliónir krónur.

Tað eru tó ikki russar, men norðmenn, sum gjalda rokningina fyri arbeiðið. Norska stjórnin hevur játtað at hjálpa russum at beina fyri gomlum kjarnorkuburturkasti á Kolanesinum, og upphøggingin er liður í hesum arbeiðinum. Teir báðir kavbátarnir, sum skulu høggjast upp, eru kjarnorkuriknir.

USA er eisini við í figgingini, og higartil eru umleið 20 gamlir russiskir kavbátar høgdir upp fyri amerikanskar pengar. Men langt er eftir á mál, tí sambært russum hava teir umleið 70 aðrar gamlar kavbátar, sum skulu høggjast upp.

## Aftur meningitis í Danmark

Trý ungfólk úr Rødovre við Keypmannahavn hava seinastu tíðina ligið á sjúkrahúsi, eftir at tað varð staðfest, at tey høvdu fingið meningitis.

Sambært dagblaðnum Urban høvdu tey trý verið á einari ungdómsveitslu tann 10. januar, og tí bóðu læknarnir øll hini umleið 60 veitslufólkini fara á sjúkrahús til kanningar. Embætislæknin í Keypmannahavn, Jane Hoffmeyer, sigur, at enn er ov tíðliga at siga, um talan er um fleiri tilburðir enn teir tríggjar, summ eru staðfestir.

Tann fyrsti av teimum trimum tilburðunum varð staðfestur fyri 14 døgum síðani, og læknarnir siga, at drongurin var í lívsvanda, tá hann varð lagdur á sjúkrahús. Hini bæði, ein drongur og ein genta, vórðu flutt á sjúkrahús seinasta leygardag.

## Eingin friður

Tað eydnaðist ikki teimum stríðandi pørtunum á Fílabeinsstrondini at semjast um vápnahvíldarsáttmálan, sum partarnir annars vóru samdir um fyri nøkrum døgum síðani.

Í gjár kunngjørdu herurin og trygdarløgreglan, at tey góðtaka ikki, at andstøðan fær umboðan í landsins stjórn. Eftir sáttmálanum, sum partarnir samdust um eftir samráðingar í París, skuldi andstøðan fáa forsætisráðharrasessin, meðan verandi forsetin, Laurent Ghagbo, skuldi halda fram.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Stórsigurin loysir ikki trupuleikarnar hjá Ísrael

**Likudflokkurin hjá Ariel Sharon, forsætisráðharra vann sum væntað stórsigur á tjóðartingsvalinum. Palestinsku leiðararnir vænta meiri ófrið**

ÍSRAEL
*Árni Joensen:*



*Ariel Sharon, forsætisráðharri og Shaul Mofaz, verjumálaráðharri fegnast um valsigurin*

Ísraelsku veljararnir góvu Ariel Sharon, forsætisráðharra eina rættiliga álitisváttan á tjóðartingsvalinum. Likudflokkurin hjá forsætisráðharranum tvífaldaði sítt tingmannatal og hevur nú 36 umboð í Knesset.

Samstundis hevði Arbeiðaraflokkurin eitt sera vánaligt val. Flokkurin misti sjey av sínum tinglimum og hevur nú 19 sessir í tjóðartinginum.

Kortini var Sharon skjótur at skjóta upp, at Likud og Arbeiðaraflokkurin skulu skipa stjórn. Í takkarrøðu síni gjáranáttina segði Sharon, at tíðin er komin, til at ísraelsmenn standa saman, og at hann tí ætlaði sær at venda sær til allar zionistiskar flokkar um at taka lut í einari savningarstjórn, sum skal verða so breið, sum til ber.

Men Arbeiðaraflokkurin fer neyvan í stjórn við Sharon. Nýggi formaðurin, Amram Mitzna, tók gjáranáttina uppaftur, at Arbeiðaraflokkurin fer ikki upp í eina stjórn hjá Sharon. Flokkurin fer heldur at bíða, til hann kann taka við valdinum aftur, segði Mitzna.

Eygleiðarar í Ísrael siga, at valsigurin hjá Likudflokkinum og Sharon loysir ikki trupulleikarnar, sum Ísrael hevur at dragast við. Ein komandi høgrastjórn verður ikki før fyri at loysa ósemjuna við palestinar, og hon verður heldur ikki før fyri at loysa teir búskaparligu trupulleikarnar, sum eru teir ringastu í mong ár, siga eygleiðararnir. Tí vænta teir, at hetta valskeiðið verður stutt.

Palestinsku leiðararnir halda lítið um valúrslitið í Ísrael. Samráðingarleiðarin hjá palestinsku sjálvsstýrismyndugleikunum, Saeb Erekat, segði í gjár, at hevur tað verið ringt higartil, verður tað verri nú.

Saeb Eerekat legði afturat, at teir palestinsku myndugleikarnir virða valúrslitið, og hann mælti ísraelsku leiðarunum til at koma aftur til samráðingarborðið.

# Bush lovar prógv ímóti Irak

**-Tað eru ikki ikki teir fremmandu hermenninir, sum eru tykkara fíggindar, men Saddam Hussein, segði Bush við irakska fólkið í røðuni gjáranáttina.**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Í næstu viku fer USA at leggja fram prógv fyri, at Irak hevur hópoyðingarvápn. Tað segði George W. Bush, forseti í røðuni, sum hann helt fyri amerikanska fólkinum gjáranáttina. Bush segði, at Colin Powell, uttanríkisráðharri fer at leggja próvtilfarið fyri trygdarráðið hjá ST í næstu viku.

Annars kom forsetin ikki við nakrari beinleiðis kríggsavbjóðing til Irak. Ístaðin mælti hann irakska fólkinum til at koyra Saddam Hussein, forseta frá. Bush segði, at irakska fólkið eigur ikki at meta teir amerikansku hermenninar í Persaflógvanum sum tess fíggindar, tí tann veruligi fíggindin hjá irakska fólkinum er Saddam Hussein, segði hann.

- Men letur Saddam Hussein ikki hópoyðingarvápnini frá sær, fara vit at gera tað fyri hann, legði amerikanski forsetin avgjørdur afturat.

# Schwartzkopf ímóti kríggi

**Amerikanski generalurin Norman Schwartzkopf, sum stóð á odda fyri teimum sameindu herdeildunum í Flógvakrígnum í 1991, heldur ikki, at USA hevur rættvísgjørt eitt álop á Irak.**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Norman Schwartzkopf, generalur, sum gjørdist sonn tjóðarhetja í USA undir Flógvakrígnum í 1991, heldur ikki grundgevingarnar hjá amerikansku stjórnini fyri einum nýggjum álopi á Irak vera nóg góðar.

Í samrøðu við blaðið Washington Post sigur generalurin, at vápnaeftirlitsmenninir hjá ST eiga at fáa betri tíð til at leita eftir møguligum hópoyðingarvápnum í Irak.

- Eg haldi tað vera sera umráðandi, at vit bíða og vita, hvat eftirlitsmenninir finna, sigur generalurin.

Norman Schwartzkopf dylir ikki fyri, at hann heldur lítið um framferðina hjá Donald Rumsfeld, verjumálaráðharra.

- Satt at siga hevur sumt av tí, sum hann hevur sagt, ørkymlað meg. Tá hann kemur á sjónvarpsskíggjan við sínum viðmerkingum, tykist tað, sum at hann skúgvar herin til viks. Tað tykist, sum er tað hann, sum stendur fremstur, og at hini bert skulu fylgja honum eftir, sigur tann kendi generalurin.



# Ferðaseðlaprísirnir skulu hækka 7 prosent

**Á samgongufundi í týsdagin varð avgjørt, at ferðaseðlaprísirnir hjá Strandferðsluni skulu allir hækka 7 prosent, og ikki millum 20 og 30, sum ætlað**

STRANDFERÐSLAN
*Ingrid Bjarnastein*



Týsdagin var samgongan á fundi um ferðaseðlaprísirnar hjá Strandferðsluni. Lagt hevur verið út í kortið, at prísirnir skulu hækka um 20 % hjá teimum størru farleiðunum, meðan tær skulu standa í stað hjá teimum minnu. Ístaðin fyri hetta hevur samgongan skotið upp at hækka prísirnar 7% á øllum farleiðunum, tí hetta er nakað, ið viðkemur øllum.

Á middegi í gjár skuldi stjórin í Strandferðsluni, Kristian Davidsen, hava roknað út um hetta lat seg gera ella ikki.

– Um hetta er reelt ella ikki dugi eg ikki at svara uppá. Nú er alt skorið yvir ein kamb, og úrslitið fáa vit um eina løtu, segði Bjarni Djurholm, tá Sosialurin fekk orðið á hann stutt fyri middag í gjár.

Strandferðslustjórin var ikki at hitta áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Ein taktiskur brølari

**Reidar Nónfjall, fyrrverandi stjóri í Strandferðsluni, heldur, at ferðaseðlaprísurin er ein taktiskur brølari, har trupulleikarnir hava verið sópaðir undir teppið í 10 ár**

FERÐASEÐLAPRÍSIR
*Ingrid Bjarnastein*



*Reidar Nónfjall, fyrrverandi stjóriá Strandferðsluni, heldur, at tað er ein taktiskur brølari við ferðaseðlaprísunum hjá Strandferðsluni. – Málið hevur verið sópað av borðinum politiskt, heldur Reidar Nónfjall*

*Savnsmynd*

– Mín viðmerking er, at hetta er ein taktiskur brølari, har trupulleikarnir eru vorðnir sópaðir undir teppið í 10 ár, sigur Reidar Nónfjall, fyrrverandi stjóri á Strandferðsluni.

Reidar Nónfjall heldur, at tað rættasta hevði verið at broytt prísirnar so líðandi ígjøgnum árini, ístaðin fyri sum nú at koma við einari stórari príshækking, tí á henda hátt tykist tað alt ov ógvusligt.

– Vit hava tosað um príshækking í fleiri ár. Nú hevur alt savnað seg saman, og vorðið til tú ført eitt rættiligt gokk í prísinum.

Tá hugsað verður um tænastuna, heldur Reidar Nónfjall, at hon er hækkað ár eftir ár, ímeðan prísirnir hava staðið stillir.

– Tá eg var á Strandferðsluni var næstan forboð fyri at røra tænastuna og tær rationaliseringarnar, sum kundu verið gjørdar har. Prísurin stóð í stað, og tænastan hækkaði. Tá var bara eitt stað at fáa peningin frá afturat, og tað var frá játtanini, sum mátti hækkast, sigur Reidar Nónfjall.

Fyri fýra árum varð byrjað at tosa um príshækkingar, og uppskot var enntá heilt frammi á tingborðinum, men tað var tikið aftur.

– Trupulleikin hevur verið sópaðir av borðinum politiskt, har politikkararnir hava latið vera við at viðgera hetta eyma punktið, heldur Reidar, sum sjálvur hevur verið útsettur fyri líknandi.

Í 1999 var játtanin til Strandferðsluna skerd 7,5 milliónir, har løgtingið síðani kravdi eina gjølla frágreiðing um virkið hjá stovninum. Frágreiðingin var klár tveir mánaðar seinni, men onki orðaskifti ella umrøða var í tinginum aftur.

– Prísirnir viðkoma okkum øllum, men eg haldi eisini, at tað eru onnur dømi um, at prísir hækka, har tað viðkemur okkum øllum. Tak til dømis SEV og Føroya Tele. Ongin blandar seg uppí, tá tey hækka prísirnar. Um nakað skil skal vera í, so má stovnurin fáa meira handlufrælsi. Har er krøv og krøv, sum tú skalt uppfylla, men onki fyrilit verður tikið.

– Tú sleppur ikki undan hesum trupulleikanum. Meira tú bíðar, størri vaksa trupulleikarnir seg, sigur Reidar Nónfjall at enda.